# fjalda dýrgripin

Síðani hava vit havt aðrar stuðlar, og sjálvt um teir ikki hava verið so leingi, sum tann fyrsti var hjá okkum, so hava teir eisini givið bæði Jonu og okkum nógv. Mátarnir, teir hava loyst sín setning, hava verið ymiskir. Ongin sigur, at júst ein máti er tann rætti. Vit saman við Jonu hava havt møguleika at læra at kenna nógvar aðrar familjur. Og sum foreldur hava vit uppdagað nýggjar møguleikar, og hvussu nógv kann gerast saman við Jonu. Nú eru vit ikki so fastløst í tí, sum altíð hevur verið rætti mátin at loysa uppgávur uppá.

Vit vóru glað fyri, at tað var møguleiki hjá Jonu at sleppa í barnagarð. Jona treivst væl ímillum hini børnini, og nógv av teimum heilsa framvegis uppá Jonu. Tá ið Jona var í barnagarðinum, fingu hini børnini møguleika at læra Jonu at kenna. Harvið lærdu tey, at vit eru ikki øll eins, men at vit øll eiga sjálvsagt pláss her í samfelagnum. Hvør veit, kanska var Jona tann, ið fer at fáa onkran framtíðar politikara at hugsa um tørvin hjá teimum menningartarnaðu. Kanska verður tað hetta ættarliðið, ið fer at kenna tað sum sjálvsagdan rætt, at tey menningartarnaðu skulu eiga pláss og møguleikar í samfelagnum.

Tíðin gekk skjótt, og Jona fór í skúla. Tíverri eri eg noydd at siga, at her varð eg rættiliga vónbrotin. Skúlaskipanin var ikki tann, sum eg hevði roknað við, at hon fór at vera. Men tá ið eg var komin yvir vónbrotið, valdi eg at royna aðrar leiðir. Eg greiddi leiðsluni frá, at eg ikki var nøgd, og at um Jona skuldi fáa nakað burturúr, so vóru tey í skúlanum noydd at lurta eftir mær og harvið saman við mær at finna betri møguleikar enn teir, sum skúlin hevði at bjóða. Leiðslan var við upp á tað, og vit fóru í holtur við at finna útav, hvussu hetta best kundi lata seg gera.

Jona hevur ongantíð havt fleiri enn tveir lærarar í senn. Tað hevur borið við sær, at møguleiki hevur verið fyri at arbeiða meiri miðvíst. Tímatalvan hjá Jonu hevur verið lagað eftir, hvat hon hevur orkað. Tað hava vit verið takksom fyri, tí hon er ofta sjúk og illa fyri.

Eg eri kanska í størri mun enn onnur foreldur sloppin at vera við í ráðleggingini av skúlaarbeiðnum hjá Jonu. Tað er kanska ikki tað rættasta, tí hetta er skúlans uppgáva, og eg sum foreldur átti ikki at havt gjørt hetta. Eg kundi sagt, at hetta var uppgávan hjá skúlanum, og at tey mugu um tað. Men tá ið vit hava so ógreið skúlaviðurskifti viðvíkjandi teimum menningartarnaðu, so haldi eg, at hetta er møguleiki hjá mær at upplýsa um, hvat eg sum foreldur haldi, at skúlin eigur at leggja dent á. Eg havi tikið hetta sum ein møguleika heldur enn eina forðing.

Orsaka av sjúkunum er Jona



*Feðgarnir Herfinn og Harald Haraldsen saman við Hildigunn, sum starvast á sambýlinum í Stoffalág í Havn*

nógv skerd. Hon er illa fyri fysiskt, hon orkar ikki væl at ganga, og hon fer sær ikki bara út ein túr. Um hon ætlar sær út, so er neyðugt, at onkur er saman við henni. Tað ber henni ikki bara til at fara at vitja onkra vinkonu, soleiðis sum aðara ungar gentur gera tað. Tað er eisini neyðugt at hjálpa henni nógv í tí dagliga. Hetta ber við sær, at tað eri eg, sum eri nógv um hana, og tá ið ein er tannáringur, so er hetta ikki altíð so stuttligt.

Á sama hátt sum eg, tá ið Jona var lítil, trongdi til at fáa umlætting, so er myndin í dag vend á høvdið. Nú er tað Jona, ið trongir til umlætting frá mammu síni. Tá ið tú ert tannáringur, um tú so ert menningartarnaðu ella ikki, so hevur tú tørv á at hava eitt frístað frá foreldrunum. Jona hevur sjálvandi kamar, har tað ber henni til at lata hurðina aftur. Men eg eri eisini takksom fyri, at hon hevur møguleika at sleppa á umlættingarheim, har hon sleppur undan mammu síni, og har tað ber henni til at hitta onnur ung og at hugna sær saman við teimum.

So umlættingin inniber tveir møguleikar - umlætting til foreldrini og umlætting frá foreldrunum. Eg má siga, at umlættingarheimið hjá okkum í Klaksvík hevur bara verið so ótrúligt. Tað er so hugaligt at samstarva við tey, tí tað kennist á øllum lutum, at tað er tørvurin hjá Jonu, sum er í miðdeplinum.

Vit eru altíð trygg við at lata Jonu fara í Dáan, tí vit vita, at har er hon í tryggum hondum. Eisini hevur Jona møguleika at sleppa í frítíðarklubb, og tað dámar henni sera væl, og har fer hon saman við stuðlinum. Og í ár royna vit henda møguleikan, at tað ber Jonu til at sleppa í Zarepta uttan mammu sína, og saman við vinfólkunum.

Tað er skjótt at staðfesta, at samfelagið er ikki nóg búgvið á øllum økjum at taka ímóti teimum menningartarnaðu. Men her hava vit avvarðandi møguleika at vísa á okkara støðu, og at upplýsa um hana. Vit hava møguleikan, men spurningurin er, um vit gera nyttu burturúr honum. Grenja vit, og eru vit frustrerað um, at ongin skilir okkum, onki ber til, skipanin er so stirvin, og lívið er so órættvíst. Ella brúka vit møguleikan at tosa, vera opin og greiða frá hvat bagir, hvat vit meta tørvurin hjá okkum er, og hvørjar visiónirnar hjá okkum eru.

## Anna Maria

Eg havi havt óteljandi møguleikar, síðani eg fekk Jonu. Frammanundan var eg farin í skrivstovulæru á einum bókhalds- & grannskoðarvirki. Eg varð liðug at læra eitt hálvt ár frammanundan, at Jona varð fødd. Mær dámdi ótrúliga væl arbeiðið, og eg hevði gjørt mær onkrar tankar um at læra nakað meiri innan hetta øki. Men fyrst ætlaði eg at vera heima og at njóta hetta barnið, sum eg gleddi meg so nógv til.

So var tað, at lívið fór so at siga av kós, tá ið vit høvdu fingið Jonu. Eg fór aftur til arbeiðis, fyrst fulla tíð, men tað vísti seg at vera ov nógv, so eg fór niður í hálva tíð. Hetta gekk fínt, inntil Jona fór at verða sjúk. Hon var ofta sjúk, og hon var álvarsliga sjúk. Tá kundi tað gerast ilt at hava rætt til fyri arbeiðsplássið, at tey ikki altíð kundu rokna við mær. Hetta var heldur ikki nøktandi fyri meg. Mær dámdi ikki, at eg ikki var at líta á.

Í samráði við stjóran varð arbeiðsuppgávan hjá mær so broytt. Eg skuldi nú fara út til viðskiftafólkini og gera arbeiðið á staðnum. Hetta bleiv so definerað sum ein uppgáva, sum skuldi gerast, og eg kundi sjálv avgera, nær hon varð gjørd. Hetta var nógv lættari, og tað riggaði fyri allar partar. Mær nýttist ikki longur at hava ringa samvitsku yvir, at tað ikki bar mær til at fara til arbeiðis hvønn dag. Ein fantastiskur møguleiki.

Tá ið eg so vitjaði á fyritøkunum, fekk eg eisini aðrar arbeiðsuppgávur at loysa. Eg lærdi meg sjálva betri at kenna. Hetta var spennandi og avbjóðandi og til nyttu í arbeiðnum.

Iscak Adizes, amerikanskur professari og ráðgevi í virkisleiðslu, sigur, at menniskja hevur fýra síður: P-A-E-I, Producent (vitan og handlikraft)-Adminstrator (ordan, skipan og smálutir)-Entreprenør (ígongdsetari, kreativitetur og viljin at vága) - Integrator (indfølingsevne, fatanin fyri menniskjaligum sambondum og evnir at fáa onnur at samstarva). Hann sigur hetta í sambandi við, at tað hjá fullgóðari leiðslu er neyðugt at hava allar hesar eginleikarnar í sær. Ongin hevur allar eginleikarnar, men vit hava øll nakrar eginleikar.

Hjá mær er stórt A viðføtt, og P ið er rímuliga stórt. Eftir at vit fingu Jonu er I ið hjá mær vorðið nógv størri. Onki er at ivast í, at Jona gav mær møguleikan at menna hesa síðuna av mær sjálvari. Kanska hevði hetta víst seg, sum tíðin leið, men nú varð eg spard fyri nógvar misfatanir, tí tað var neyðugt at læra skjótt, og eg havi verið tilvitað um, at tað var alneyðugt at læra at samstarva um fleiri viðurskifti og lutir enn áður. Eg kundi kanska bara havt sagt, at soleiðis eri eg bara, men tað hevði ikki hjálpt Jonu serliga væl. Tað var neyðugt hjá mær at læra, og eg fekk møguleikan tíðliga, og tað eri eg fegin um.

Tá ið eg nú eri vorðin tilvitað um hesar síður av mær sjálvari, so havi eg eisini funnið mær aðrar uppgávur at arbeiða við. Hetta gav mær nakað at hugsa um. Eg havi sæð mær møguleika at fari undir at nema mær annan fakligan kunnleika, har eg kann menna meg, og at brúka fleiri síður av mær sjálvari, sum eg als ikki hevði havt hugflog til áður.

Tað, at fáa eitt barn, ið ber brek, ger, at tú fert at hugsa nógv meir um tingini. Tú endavendir øllum, og sum eg havi sagt, so fær ein onnur virði her í lívinum. Men tú fert eisini at hugsa meiri um alt tað, tú gert, um tað nú er neyðugt, ella um tú bara fylgir rákinum. Tú mást á ein ella annan hátt taka støðu til so ótrúliga nógv. Tú mást raðfesta tíðina øðrvísi, og harvið er tað neyðugt hjá tær at hugsa teg meiri um.

## Ommur og abbar

Dýrgripurin, ið kom á okkara leið, hevur ikki bara ríkað tilveruna hjá okkum foreldrum og systkjum hennara. Men ommur, abbar og hini í familjuni eru eisini ríkað av at kenna henda dýrgripin. Jona er ikki sum tannáringar flest. Tá ið tey koma í henda aldurin, so plaga tey ikki at hava tíð til ommur og abbar. Men Jona er ótrúliga trúføst. Hon elskar at vitja ommu og abba, og hon elskar at gleða tey við onkrum, ið hon hevur bakað ella tilevnað.

Tá omma og abbi í Danmark vitja heim, ja, so skundar Jona sær at ynskja teimum vælkomnum. Tey fáa eitt orduligt klemm, og hon tosar ikki um annað, enn at nú eru tey komin.

Hon er ein sannur dýrgripur. Um tú ikki ert í góðum lag, ja so verður tú tað, tá ið hon kemur at vitja. Hon elskar at hoyra látur, og hon ber gleði við sær.

## Lívið

Gud gevur okkum øllum lív. Framtíðarvánirnar eru ikki tær somu hjá okkum øllum, men Gud hevur eisini givið okkum evnir og gávur - møguleikar. Tað er upp til okkum, um vit ynskja at brúka alt hetta, sm hann hevur til okkara. Um vit ynskja at gera brúk av teimum evnum og møguleikum, sum hann gevur okkum, so skal lívsferð okkara eydnast, tí hann stiðjar okkum á leiðini. Og tá ið vit læra okkum at hyggja upp um trupulleikarnar og ikki at stara okkum blind á teir, so gerast teir knappliga so lítlir, og vit fáa greiði á teimum.

Eftir at náttúran hevði steðgað okkum við slíkari kollvelting, so fekk eg tíðliga møguleikan at hugsa meg um. Hvat er tað, sum hevur stórt virði her í lívinum, hvat vil eg og ætli eg mær, og soleiðis kundu vit hildið á. Eg upplivdi tað óspilta við einum barni, ið ber brek. Tey eru so góð, kærleiksfull, glað, rein og eg kundi hildið á. Hetta gav mær nakað at hugsa um. Skuldu vit bara liva víðari í somu rillu, pressa eftir at liva sum áður. Tað, sum vit vanliga kalla eitt normalt lív, ella skuldu vit út frá teimum karmum, náttúran nú hevði givið okkum, skapa okkara ævintýr. Skuldu vit góðtaka og liva í pakt við tann møguleikan, sum náttúran nú gav okkum, og skuldu vit ikki bara balla okkurt um tornirnar og njóta vakurleikan og luktin frá rósuni. Skuldu vit ikki lata eyguni upp og og fara undir at pakka tann fjalda dýrgripin út, og njóta allar tær bjørtu strálir, hann sendir út.

Og tað er til hetta, at okkara ævintýr komið. Vit hava verið í hesum í fimtan ár. Vit liva framvegis, og vit hava tað gott. Vit gera brúk av teimum møguleikum, ið samfelagið hevur til júst okkara. Vit hava møguleikan at upplýsa um tað, vit halda eigur at verða betri ella øðrvísi. Vit fingu eyguni upp fyri møguleikanum at fara aðrar vegir/umvegir, tá leiðin vit stýrdu ikki gekk longur.

Ævintýrið er fullkomið, tá Jona - okkara dýrgripur - kemur og klemmar okkum, mammu og babba, og gevur bæði okkum og systkinum ein ordiligan muss, og systkini siga: Á sum Jona er fitt og ker, vit elska teg, tú ert fittast í verð!